# Skjóta seismikk í Leirvíksfirði



*Norska seismikkskipið Max Viking skýtur seismikk í Leirvíksfirði í samband við undirsjóvartunnilin millum Eysturoy og Borðoy*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Kanningar í samband við undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfjørð verða nú gjørdar**

SEISMIKSKJÓTING
*Edvard Joensen*

Norska seismikkskipið Max Viking er í hesum døgum á Leirvíksfirði, har teir skjóta seismikk í samband við undirgrundarkanningarnar til undirsjóvartunnilin millum Eysturoy og Borðoy.

Óli Petersen á Landsverkfrøðingsstovninum sigur, at skjótingin byrjaði seinast í juni, tá skipið kom úr Noreg.

Síðan hevur streymurin gjørt, at ikki hevur verið skotið nakrar dagar, men byrjað verður nú aftur, sigur Óli Petersen.

Tað ber ikki til at siga nakað nágreiniligt frá kanningunum enn, sigur hann. Fyrst verða royndir gjørdar yvir eitt størri øki á firðinum. Og tá tær so eru kannaðar og viðgjørdar, verður farið at finna fram til, hvar sjálvur tunnilin skal liggja.

Kanningarnar fara helst at vara til einaferð út móti ólavssøku, verður sagt frá Landsverkfrøðinginum.

So tað gongur nokk ein tíð enn, áðrenn nakað meira ítøkiligt um undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfjørð verður at frætta.

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

Juni mánaði bleiv bæði kaldari og eitt sindur turrari enn vanligt. Miðalhitin bleiv 7,8 stig, móti 9,0 stigum.

Affallið bleiv 54,4 mm móti miðal 66,0 mm.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | -- |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 17 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 39 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 31 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga eystureftir.




Lágtrýstið yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað, og vestan fyri lágtrýstið rekur kaldari luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/07 kl. $06^{00}$– 11/07 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 4,9 mm – mált frá 10/07 kl. $06^{00}$– 11/07 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 27,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. juli: Seinna kvarter
20. juli: Tendring - Økusól
21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juli | 00.00 | 12.18 | 11.18 | 23.49 | 11.33 | — | 02.00 | 14.18 | 03.00 | 15.18 | 10.33 | 23.04 | 09.33 | 22.04 | 00.15 | 12.33 | 01.15 | 13.33 | — | 12.03 | 01.00 | 13.18 |
| 13. juli | 00.49 | 13.21 | — | 12.21 | 00.04 | 12.36 | 02.49 | 15.21 | 03.49 | 16.21 | 11.36 | — | 10.36 | 23.03 | 01.04 | 13.36 | 02.04 | 14.36 | 00.34 | 13.06 | 01.49 | 14.21 |
| 14. juli | 01.48 | 14.16 | 00.48 | 13.16 | 01.03 | 13.31 | 03.48 | 16.16 | 04.48 | 17.16 | 00.03 | 12.31 | 11.31 | 23.54 | 02.03 | 14.31 | 03.03 | 15.31 | 01.33 | 14.01 | 02.48 | 15.16 |
| 15. juli | 02.39 | 15.03 | 01.39 | 14.03 | 01.54 | 14.18 | 04.39 | 17.03 | 05.39 | 18.03 | 00.54 | 13.18 | — | 12.18 | 02.54 | 15.18 | 03.54 | 16.18 | 02.24 | 14.48 | 03.39 | 16.03 |
| 16. juli | 03.25 | 15.48 | 02.25 | 14.48 | 02.40 | 15.03 | 05.25 | 17.48 | 06.25 | 18.48 | 01.40 | 14.03 | 00.40 | 13.03 | 03.40 | 16.03 | 04.40 | 17.03 | 03.10 | 15.33 | 04.25 | 16.48 |

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original bosal Útstoyt
ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

www.sosialurin.fo

Flog-ferðir
ring 345900